HAGTALSGRUNNURIN

# GOYM FYRISPURNING

HAGSTOVA FØROYA

# Endamál

Brúkar tú somu hagtøl regluliga og ynskir at síggja eina dagførda útgávu, kanst tú goyma valda fyrispurningin.

Goymir tú fyrispurningin, sleppur tú undan at leita fram og velja hagtølini í Hagtalsgrunninum. Tú fært eina internetadressu, sum verður brúkt, tá tú vilt venda aftur til eina dagførda útgávu av hagtølunum.

**DØMI**

Vegleiðingin byggir á eitt dømi, hvar tú ynskir at síggja nýggjasta talið av løntakarum í vinnugreinum innan fiskivinnuna seinasta hálva árið.

## Soleiðis gert tú

Vel hesa talvuna undir “Arbeiði og lønir“ og “Løntakarar“:

AM03021 Løntakarar skiftir á vinnugrein og kyn (1985M01-2016M10)

Her velur tú vinnugreinarnar “Tils. (vinnugrein)”, “Fiskiskapur”, “Ali- og kryvjivirki», ”Fiskavøruídnaður”. Harumframt velur tú 6 teir nýggjastu mánaðirnar“.



Trýst á knøttin “Halt áfram”. Nú kemur henda talvan fram:

+ Goym fyrispurning

**AM03021 Løntakarar skiftir á vinnugrein og kyn (1985M01-2016M11)**

| | 2016M05 | 2016M06 | 2016M07 | 2016M08 | 2016M09 | 2016M10 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tils. (vinnugrein) | 25.197 | 25.555 | 25.912 | 25.831 | 25.537 | 25.499 |
| Fiskiskapur | 1.503 | 1.476 | 1.483 | 1.478 | 1.438 | 1.486 |
| Ali- og kryvjivirki | 931 | 937 | 996 | 999 | 1.015 | 1.074 |
| Fiskavøruídnaður | 1.264 | 1.338 | 1.322 | 1.384 | 1.414 | 1.408 |

Goym nú fyrispurningin við at trýsta á:

+ Goym fyrispurning

Tú sært nú tríggjar møguleikar.

Hvat skal goymdi fyrispurningurin gera, um talvur verða dagførdar við nýggjum tíðarskeiðum?

- (●) Dagfør fyrispurningin við fastari byrjunardagfesting og nýggju tíðarskeiðini
- ( ) Dagfør fyrispurningin við rullandi byrjunardagfesting og sama tali av tíðarskeiðum
- ( ) Dagfør ikki fyrispurningin, men vís somu tíðarskeið sum á skíggjanum

Vel møguleikar nummar tvey, ið ger, at tú altíð fært seinastu 6 mánaðirnar:

(●) Dagfør fyrispurningin við rullandi byrjunardagfesting og sama tali av tíðarskeiðum

**HENT RÁÐ**

Tú kanst eisini velja at fáa lagt eitt tíðarskeið afturat, heldur enn at fáa seinastu 6 mánaðirnar. Tað merkir, at tú í staðin fært 7 mánaðir næstu ferð, síðan 8 mánaðir og so framvegis. Tá velur tú fyrsta møguleika. Tú kann eisini velja ikki at fáa nýggj tíðarskeið, men fáa neyvt somu tíðarskeið, sum víst eru á skíggjanum. So velur tú triðja møguleika.

Tú ynskir at síggja neyvt somu uppseting av talvuni, sum hon sær út á skíggjanum, so vit velja:




So tú trýstir á:




Tú fær nú hesa hesa leinkjuna:




Leinkjan kann goymast til at brúka seinni.

Um tú setur leinkjuna inn í ein kaga (‘browser’), kemur talvan fram aftur. Um nýggj tøl eru komin síðani seinast, so eru tað tey nýggjastu tølini ið verða víst.

**HENT RÁÐ**

Fyrispurningurin kann eisini goymast í øðrum sniði, sum t.d. Excel og CSV.

